TVØROYRAR KOMMUNA

## LEIÐARI TIL FRÍTÍÐARSKÚLAN

Søkt verður eftir leiðara til Frítíðarskúlan í Tvøroyrar kommunu fyri leiðara í barnsburðrafarloyvi í 1 ár.

**Stovnslýsing:**
Frítíðarskúlin er normeraður til 24 børn í 1. og møguliga 2. og 3. flokki. Hann heldur til í hølum hjá Trongisvágs Skúla, í náttúruríkum og barnavinarligum umhvørvi.

**Starvslýsing:**
Talan er um eitt avloysarastarv 40 tímar um vikuna. Arbeiðið er deilt upp soleiðis at 20 t./v. er sum leiðari og 20 t./v. sum pædagogur. Arbeiðstíðirnar eru skiftandi millum kl. 10.00-18.00. Starvið verður sett í tíðarskeiðnum 01.03.07-01.03.08.

Bert umsøkjarar við námsfrøðiligum prógvi kunnu søkja starvið.

**Vit vænta av tær:**
- at tú hevur góð samstarvsevni
- at tú ert nærløgd/lagdur
- at tú kanst laga teg eftir skiftandi arbeiðstíðum
- at tú ert kreativ/ur
- at tú ert før/ur fyri at taka tað fakligu, fíggjarligu og fyrisitingarligu ábyrgdina av stovninum.

**Lønarviðurskifti:**
Løn sambært sáttmála við pedagogfelagið.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Susanne Madsen á sosialu deild, tlf. 371085.

Freistin at søkja starvið er 16/2-07

Umsókn saman við prógvum o.ø., verða at senda til

**Tvøroyrar kommuna**
Sosiala deild
Postboks 80
FO- 800 Tvøroyri

Runavíkar kommuna søkir eftir

## Starvsfólki til Barnagarðin á Mýrunum

Á Barnagarðurin á Mýrunum ganga 94 børn. Á stovninum eru 2 vøggustovur við 14 børnum í hvørjari, 2 barnagarðsstovur við 20 børnum í hvørjari, 1 barnagarðsstova við 20 6-ára gomlum børnum og 1 stova við børnum við serligum tørvi.

Umstøðurnar á stovninum eru sera góðar við ljósum rúmligum stovum við eyka spælirúmi. Harumframt er verkstaður, sansirúm, samtalu/venjingarrúm og stórt felagsrúm við barnavinarligum køki. Stovnurin liggur í vøkrum náttúrulendi beint við Toftavatn og nær við ítróttarøkið.

Endamál stovnsins er, við støði í tí einstaka barninum at geva tí møguleika at mennast, bæði persónliga og saman við øðrum. Fyri at røkka málinum er neyðugt við einum tryggum og stimbrandi umhvørvi, við góðum samstarvi millum leiðslu, starvsfólk og foreldur.

**Vit ynskja tí at umsøkjarin:**
- hevur umsorgan fyri børnum
- hevur góð samstarvsevni
- er íðin, nærlagdur og álítandi
- hevur gott yvirlit og megnar at skipa dagin
- er nýhugsandi og ígongdsetandi

**Søkt verður eftir:**
Pedagogi, hjálparfólki, ergo/fysioterapeutur ella einum við viðkomandi útbúgving 25-30 t. um vikuna, til eitt 3 ára gamalt rørðslutarnað barn

Starvið, er inni í einari barnagarðsstovu. Uppgávan hjá tí, ið settur verður, kemur primert at snúgva seg um at stuðla barninum í geradisdagnum.

Setan verður frá 1. mars 2007 ella eftir nærri avtalu.

Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Nærri fæst at vita um størvini við at tosa við Eyðnu Norðfoss leiðara ella Mariu í Króki varðaleiðara á tlf. 448254 ella 218254.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skal vera kommununi í hendi í seinasta lagi mánadagin 19. feb. 2007, kl. 12,00.

**Runavíkar Kommuna**
Sosiala deild
Heiðavegur 26
600 Saltangará

Gøtu Kommuna

## Varaleiðari søkist til dagstovnin í Gøtu

Pedagogur søkist til at arbeiða sum varaleiðari á barnagarðsstovuni Látrinum.

Arbeiðstíðin er 30 tímar um vikuna á stovuni og 5 tímar um vikuna í samband við varaleiðarastarvið.

**Í dagliga arbeiðnum leggja vit m.a. stóran dent á:**
- at børn og starvsfólk trívast og eru í menning.
- at hava gott samstarv við foreldur og starvsfólk.
- at skapa álit og tryggleika, bæði fyri foreldur og børn.
- at virða tað einstaka barnið í bólkinum.

**Vit ynskja:**
- at tú hevur góð samstarvsevnir.
- at tú hevur hug og áðræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerðandisdag.
- at verða við til at mynda og menna tað pedagogiska umhvørvi.
- er í leiðarans staði, tá ið hesin er burturstaddur.
- er leiðaranum til hjálpar í leiðarastarvinum.

Dagstovnurin lat upp 1. februar 2000, og liggur í hugnaligum og barnavinarligum umhvørvi, við Gøtugjógv.

Um eingin pedagogur søkir, verður starvið fyribilssett við hjálparfólkið tíðaravmarkað til august 2007.

Lønin er sambært sáttmála ímillum Føroya Pedagogfelag og Føroya kommunala Arbeiðsgevarafelag

Nærri upplýsing um starvið fast við at venda sær til Torgerð Hansen leiðara, fartlf. 771008.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvi og ummælum skal sendast okkum í seinasta lagi 25. feb. 2007 kl.10.00.

Bygdaráðið tekur sær rætt til frítt at velja ímillum umsóknirnar ella ongan at seta.

**Dagstovnurin í Gøtu**
Postboks 32
Vaktarhúsvegur 1.
511 Gøtugjógv

## Frá Bátafelagnum á Toftum

Lýst verður til aðalfund tann 24. feb. klokkan 19:00 í hølunum hjá Arbeiðarafelagnum á Toftum.

Skrá smb. lógum felagsins.

***Bátafelagið á Toftum***

## Gerið kvettið




**Tann ultimativi Jeepurin - 69.350 km**
V8 - Jeep Grand Cherokee Ltd. Leðursetur, cruisecontrol, air-cond., navigatión, sleipikrók, píkadekk, anlegg v/10CD og ein rúgva av øðrum.

**STUBBIN** Fjarðarvegur 12, Vestmanna
Tlf. 471 800 stubbin@stubbin.fo www.stubbin.fo

## Eftirlýsing

Tann sum var á vitjan hjá mær uml. 30. des. og tók mín stav í gongini og setti sín egna eftir, biðist vinarlig ringja til mín ella at koma inn á gólvið við stavinum.

Eg hevði fegin vilja fingið hann aftur.

**Hensia Jacobsen**
Syðrugøtu
Tlf. 441014

## Aðalfundur

Aðalfundurin hjá Sandoyar Javnaðarfelag verður tann 10. mars kl.19.00 í Samljóð í Skopun. Hugnaløta verður aftaná aðalfundin, møtið fjølment.

*Sandoyar Javnaðarfelag*